## Christmas Child Føroyar

# Ein gloymd skógvaeskja

**4 Fólk: 3 eskjur og ein berari.**
**Rósa: Ein eitt sindur kedd eskja. Og eitt sindur skrødd**
**Jonna: Fitt og forelskað í Remi. Alminduliga flott eskja**
**Remi: Sær tað góða í øllum. Ekstra fín og pynta eskja**
**Tað ber eisini til at bíta um, so at tað eru 2 mannfólk og eitt konufólk. (Líka sum á youtube)**
**Sí youtube video her: https://www.youtube.com/watch?v=CXVpiIngJ3A**
**Ella leita á youtube: Operation Christmas Child - River Run Christian Church**

*Rósa murrar jólasang fyri seg sjálva. T.d. Gleðilig jól*

*Jonna verður borin inn.*

Jonna: Hvar er træið?

Rósa: Hvat?

J: Hvar er træið! Greinar, kúlur, perur og stjørnan á toppinum!

Ró: Áh, jólatræ! Tú skalt ikki undur eitt jólatræ.

J: Sært tú meg? Síggi eg út sum ein páskahara? Sjálvandi skal eg undir eitt træ!

Ró: (Eitt sindur sarkastisk) Kedd av at skuffa teg, men tú fert ikki undir eitt træ í ár. Tú fert at bíða her eina tíð, so fert tú í ein lastbil, ein bát, ja hvør veit.

J: Ein Bát? Lastbil? Veist tú ikki? Meinar tú ikki reinsdjór og sledu?

Ró: Nnnei, ongin reinsdjór ella sleda, men kanska ein jeep, eina súklu ella ein kamel.

J: Tú veist kanska ikki hvør eg eri. Eg eri partur av einari mega høgtíð sum er um allan heimin. Og eg eri da besta.

Ró: Ja tú ert da besta.. tú ert.. dadadadaaa.. Ein christmas child skógvaeskja! Og tú skalt nokk sleppa at verða ein gáva til eitt barn. Men veist tú hvat tað kulasta við tí er! Tú ert nokk tann allar fyrsta gávan hjá hesum barninum. Og so fara fólkini her at koyra eina lítla bók í, sum fortelur børnunum um Jesus.

J: Men.. eg havi eitt jojo í her. Og eitt hoppiband og húgvu. Sápu og eina tannbust. Also her er onki pláss eftir.

Ró: Tað er altíð pláss fyri bókini. Sært tú hendan bókin...

*Remi verður borin inn syngjandi.*

Re: tralalalala (onkran festligan jólasang) t.d. Tað er jólaaftan, klokkan ring)

Ró: ( rullar við eygunum og suffar. ) áááarrrhh

J: (Sindur forelskað) Hvør er hatta?

Ró: Hvør er hatta?! Ikki lata útsjóndina lumpa teg. Bara tí hann hevur nógv flottari papír, heldur hann seg vera tann viktigasta eskjan sum er.

J: (Við Remi) Heeey ☺ ☺ hihihiih. Hvussu hevur tú tað?

Re: Hey. Super!

J: Ja ooooog eeeeeg.

Ró: Arrgh eg spýggi. (Spælur sum hon er tey) "Tú ert so pen" "Og tú sært so gott út" "Kom og geri okkurt gott í heimunum!" "Jaaaaaaa" plæææh

J: Tú burdi fingið tær eitt súrepli.

Ró: Hey! Tú hevur ikki verið her líka longi sum eg.

Re: (Tekur synd í Rósu) Ah, hevur tú verið her longi? Tú sært so kedd út, men hygg eftir hesum staðnum, her er fantaskiskt. Fult av gávum og jólagleði og waaaaooooow.

Ró: Jaaa, tað er.. Men tað hevur ikki verið so stuttligt alla tíð.. Fyri einum árið síðani, tá eg bleiv gloymd..

J: Haaa? Hevur tú verið her eitt heilt ár?!

Ró: Ja.. eg var saman við fleiri eskjum í fjør, men so gloymdu tey at lata meg inn til tíðina. Allar hinar eskjurnar vóru farnar, tí freistin var farin. Typiskt søldfirðingar(Ella okkurt annað).. Hinar eskjurnar eru farnar til nógv onnur flott lond og deila boðskapin um Jesus og eg...siti bara her...og bíði.

Re: Aaah tað er synd. Men í ár verður tað!

Ró: Eg veit ikki. Papíri er fari. Kanska um eg rætti sloyfuna, bíta tennirnar saman og "Eskji meg up"! Eg veit at mín lagna er avgjørd! Mín lagna at boða einum barni um Jesus! Og eg ætli mær at gjøgnumføra mína lagnu!

J: Tú ert tann skrappasta eskjan eg nakrantíð havi møtt.

Ró: Takk!

Re: Og eg haldi tú sært gott út fyri tín aldur. Wooow

Ró: Ehh, takk...

J: Tú hevur verið her longst, so tú veist hvussu man ger.. hvat er næst?

Ró: Ja... vit bíða!

*Lítil pausa. Remi murrar.*

Re: hmhmhmm.. tað er stuttligt at bíða.

J: (Glað!) Nú verður tað skjótt.

Ró: (Meir niðri á jørðini) Tað verður ikki ennnnn

Re: Men hesaferð fara vit ikki uttan teg!

J: Ja! Ongin eskja verður gloymd eftir!

Ró: Ivist um tey fara at brúka meg í ár.. (Berarin kemur inn) hygg nú kemur onkur eftir tær. (Hyggur yvir á Jonnu) Slíkar eskjur sum tú eru altíð so heldigar (Berarin tekur Rósu) Wao! Hann tók meg! Eg visti tað, góð ting henda fyri góðar eskjur! ..eg burdi hildi eina talu.. ehh.. (Rópar meðan berarin berur hana út) EG FARI AT GJØGNUMFØRA MÍNA LAGNUUUU..

Re: Beeei vit biðja fyri tær.

J: Góða eydnu.

...

Re: Hmm.. so eru vit her.

J: Hhihihi jaaaaa..

Re: Dámar tær at syngja?

(Fara syngjandi út av pallinum.)